# Misskilt útbjóðing

**Fleiri teirra, sum í dag koyra bussar hjá Bygdaleiðum, eru ónøgdir við útbjóðingartilfarið, sum Strandferðslan hevur sent út í samband við útlisitering av leiðunum. Teir óttast millum annað íløgur í nýggjar bussar. Tað stavar í ávísan mun frá misskiljingum, sigur Strandferðslan**

ÚTLISITERING
*Edvard Joensen*




*Í útbjóðingartilfarinum viðvíkjandi Bygdaleiðum verður kravt, at bussarnir eru rímiliga nýggir og í góðum standi*

*Mynd: Edvard Joensen*

Fleiri bussførarar hjá Bygdaleiðum eru ónøgdir við tilfarið, sum Strandferðslan hevur latið út í samband við útbjóðing av leiðunum. Millum annað eru teir, sum eiga gomlu bussarnar, ónøgdir við, at aldursmark verður sett á bussarnar, so teir noyðast at gera stórar íløgur í nýggjar bussar. Og tosið manna millum um útbjóðingina hevur eisini fingið fólk, sum ferðast við Bygdaleiðum, at kenna seg ótrygg.

Men tað er eingin grund hjá hvørki bussførarum ella ferðafólki taka útbjóðingatilfarið sum nakra endaliga loysn, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins, sum stendur fyri útbjóðingini.

Fleiri teirra, sum hava vent sær til Sosialin við viðmerkingum til útbjóðingina, hava víst á, at har eru so nógvir feilir í tilfarinum, at tað kann ikki brúkast. Eisini verður víst á, at ferðaætlaninar, sum eru í tilfarinum, als ikki kunnu brúkast av vanligum fólki.

Til dømis er ferðaætlanin úr ávísum øki í landinum løgd soleiðis, at ikki ber til hjá fólki, sum arbeiðir í Havn – teimum sonevndu pendlarunum – at fara heiman á morgni og vera í Havn til vanliga arbeiðstíð, sum higartil hevur verið gjørt.

Til tað sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari, at hasar ferðaætlaninar, sum standa í útbjóðingartilfarinum, als ikki eru tær endaligu ætlaninar.

– Sjálvandi eru tær ikki tað, sigur hann. Hatta eru bara modell, sum vit hava sett upp fyri at vísa á, hvussu tað møguliga kann gerast.

Hann sigur, at hann er greiður yvir, at tað eru fleiri feilir í tilfarinum, men at tað ikki er annað enn vanligt, tá slíkt tilfar verður latið út.

Hinvegin heldur hann, at tað hevði verið rættari, um fólk, sum høvdu atfinningar og viðmerkingar, søgdu Strandferðsluni frá hesum, áðrenn tey fóru í pressuna við tí.

## Óttast íløgur

Lagt verður í útbjóðingartilfarinum upp til, at bussarnir, sum fara at koyra ruturnar í framtíðini, skulu vera rímiliga nýggir og í góðum standi.

Tað eru ikki allir, sum koyra í dag, sum hava nýggjar bussar, og tá aldursmark verður sett á bussarnar, vænta fleiri teirra, at teir rísa ikki undan aftur eini íløgu upp á hálvatriðju millión til ein nýggjan buss. So kunnu teir tað sama bara gevast, verður víst á.

Onkur bendir tað tann vegin, at útbjóðingartilfarið er gjørt soleiðis, fyri at fáa so fáar stórar og peningasterkar fyritøkur sum gjørligt at yvirtaka alla koyring hjá Bygdaleiðum. Harvið verða kanska eini 40 fólk søgd úr starvi, verður víst á.

Poul Jákup Thomsen váttar, at ætlanin er at hava koyringina á so fáum hondum sum gjørligt. Ella í so fáum eindum sum gjørligt, sum hann tekur til.

Tað merkir, at eitt nú Suðuroy, Sandoy, Vágar og Norðoyggjar verða bodnar út undir einum. Sum so aftur merkir, at Strandferðslan bara skal samstarva við ein arbeiðstakara í økinum.

– Tað vil tó ikki siga, at bara ein av verandi bussførarunum kann bjóða upp á koyringina, sigur hann. Tað kunnu allir, um teir bara kunnu samstarva og til dømis stovna eitt felag, sum tekur leiðirnar á seg og síðan letur teimum ymsu bussførarunum leiðirnar aftur at koyra í egnum bussum.

Men støðið á bussunum skal vera i lagi, sigur fólkaflutningsleiðarin. Tað liggur í endamálsorðingini hjá Strandferðsluni og verður ikki gingið frá.

## Bara summir bussar

Gjørt hevur verið vart við, at tað eru bara teir privatu bussarnir, sum skulu privatiserast.

Í tí liggur, at Strandferðslan fer at hava nakrar bussar eftir, sum stovnurin sjálvur skal reka. Og hesir vera teir bestu bussarnir, sum koyra á rutunum, sum í dag geva yvirksot, verður sagt.

– Tað er rætt, at vit fara at hava eitt nú flogleiðina úr Havn vestur á flogvøllin eftir fyrstu tíðina, sigur Poul Jákup Thomsen. Men hon verður boðin út seinni, leggur hann dent á. Helst eftir jól komandi ár.

Men tað hevur einki við útbjóðingina annars at gera, sigur hann, tí sáttmálaranir, sum gjørdir verða, fara at vera bruttosáttmálar. Tað vil siga, at tann, sum átekur sær at koyra, ger tað fyri eina ávísa, fasta upphædd, sum verður avroknað við Strandferðsluna. Inntøkur og útreiðslur fara ikki at ávirka sáttmálan, sigur Poul Jákup Thomsen.

Fyri at fáa sum mest av ótryggleika og iva burtur, beyð Strandferðslan í sjálvum útbjóðingartilfarinum teimum, sum ætla at bjóða upp á koyringina, á fund í Havn seinnapartin í gjár. Fundurin skuldi vera, eftir at blaðið var farið til prentingar.

# Møtti manninum í Mikladali

**Mikladalur hevur eitt serligt pláss í søguni hjá nýggja ríkisumboðnum. Tað var har, tað rann saman millum hana og mannin**

RÍKISUMBOÐ
*Edvard Joensen*



*Nýggja ríkisumboðið, Birgit Kleis, hevur fyrr arbeitt hjá ríkisumboðnum í Føroyum*

Hóast tey bæði eru donsk, ríkisumboðið og maðurin, var tað í Mikladali, at tað rann saman teirra millum. Nú eru tey aftur í Føroyum, her Birgit Kleis tekur við sum ríkisumboð tann 1. november í ár.

Komandi rikisumboðið, Birgit Kleis, varð útbúgvin juristur í 1985 og hevur síðan arbeitt í danska løgmálaráðnum. Tó var hon í tíðarskeiðnum 1986-1988 hjá ríkisumboðnum í Føroyum og er tí ikki heilt ókend her.

Tað var, meðan hon arbeiddi hjá ríkisumboðnum, at ungur maður, Brian Gronemann, kom úr Danmark at vitja kenningar í Føroyum. Felags kenningar teirra Birgits. Og á eini vikuskiftisferð í Mikladali varð so teirra lívsleið løgd.

Birgit Kleis og Brian Gronemann hava tvey ættleidd børn úr Vitenam. Seks ára gamla Thomas og trý ára gomlu Mariu. Thomas fer í skúla í Føroyum, tá tey koma aftur hendanveg seinni í heyst. Hann skal ganga í fyrsta flokki í Kommunuskúlanum í Havn.

Birgit Kleis sigur í tí sambandinum, at tey hava fingið samband við ein føroyskan lærara, sum skal læra børnini føroyskt.

Sjálv dugir hon enn nakað av føroyskum, síðan hon var í Føroyum í áttatiárunum. Men tað ætlar hon sær kortini at bøta munandi um, soleiðis at hon skilir hvørt orð. Hvussu tað verður við at tosa føroyskt, er so ein onnur søga.

– Tó ætli eg at læra meg at siga øll nøvn og tilíkt rætt á føroyskum, sigur nýggja ríkisumboðið.

Birgit Kleis gleðir seg til at taka við starvinum tann fyrsta november. Politiska støðan í løtuni ger tað til eitt sera spennandi starv, sigur hon. Hon ætlar sær at halda somu kós sum undangongukvinnan, Vibeke Larsen, og hon væntar ikki at gerast arbeiðsleys hesi trý árini, skeiðið varar.

Tað eru 10 ársverk normerað hjá ríkisumboðnum, og verða tey í dag røkt av 12 starvsfólkum.



# Óli Holm góðkendi Trøllanes-brævið

**Landsstýrismaðurin við skúlamálum tekur fulla ábyrgd av málinum um skúlan á Trøllanesi. Hann fegnast um, at málið verður kannað, so ógrundaðar ákærur ikki hanga í luftini**

TRØLLANES-TRÆTAN
*Eyðun Klakstein*



*Óli Holm sigur seg fegnast um, at málið um skúlan á Trøllanesi verður kannað, so ógrundaðar ákærur ikki hanga í luftini*

Óli Holm ger nú greitt, at hann tekur fulla politiska og løgfrøðisliga ábyrgd av málinum um skúlan á Trøllanesi.

Hann staðfestir, at hann góðkendi nógv umrødda brævið til Mikladals kommunu, og hann sigur seg fegnast um, at málið verður kannað, so ógrundaðar ákærur ikki hanga í luftini.

– Í fyrsta umfari eri eg endurgivin fyri at leggja ábyrgdina av málinum á undanfarna landsstýrismann. Og í løtuni stendur eftir ein mynd, har ábyrgd verður løgd á eitt embætisfólk, ið hevur sent tað nógv umrødda brævið til Mikladals bygdaráð.

– Tað er mær tí sera umráðandi at gera púra greitt, at eg taki alla ábyrgdina av hesum málinum – bæði politiskt og løgfrøðisliga, sigur Óli Holm.

## Eingin endi

Skúlatrætan á Trøllanesi er vorðin ein framhaldssøga, har eingin enn hómar endan. Umframt óvissuna hjá foreldrunum á Trøllanesi, sum vilja hava skúla aftur í bygdina, hevur landsstýrismaðurin við skúlamálum eisini verið kroystur í málinum.

Í august mánaði álegði Mentamálastýrið Mikladals kommunu at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur, tí hetta hevði landsstýrismaðurin avgjørt. Eingin heimild var fyri hesum boðum úr Mentamálastýrinum, og tað hevur skapt rumbul.

Støðan gjørdist ikki frægari av, at fjøðmiðlar ikki fingu týðandi Trøllanes-brævið, tá teir bóðu um innlit í málið. Mentamálastýrið hevur sagt, at talan var um eitt mistak, men fólk í umsitingini og fyrrverandi landsstýrismaðurin siga seg ivast í hesum.

## Góðkendi brævið

Brævið, sum í august mánaði varð sent Mikladals kommunu, var ikki undirskrivað av Óla Holm, og landsstýrismaðurin hevur áður sagt, at hetta var bara ein fráboðan fyri undanfarna landsstýrismann, Torbjørn Jacobsen, sum vildi hava skúlan á Trøllanesi tiknan í nýtslu aftur.

Løgfrøðingur segði tó við Sosialin, at brævið úr Mentamálastýrinum er formliga avgerðin í málinum, og tí hevur Óli Holm tikið avgerðina í hesum máli. Ein avgerð, sum eingin heimild var fyri sambært kommunulógini.

Óli Holm viðurkennur nú, at hann hevur ábyrgdina av hesum brævi og málinum sum heild.

– Eg góðkendi at senda bræv til Mikladals bygdaráð um málið, sigur hann.

Óli Holm sigur seg harmast um, at politiski parturin av málinum er druknaður í løgfrøðisligum lutum.

– Málið átti at verið ein spurningur um vælvild, samstarv og skúlapolitikk í landinum. Og málið eigur at snúgva seg um, hvar er best fyri skúlagongdina hjá næmingunum á Trøllanesi og í Mikladali, sigur landsstýrismaðurin.

## Knútur kom á málið

Óli Holm hevur í einum skrivi til fjølmiðlarnar sagt sína hugsan um gongdina í Trøllanes-málinum.

Hann vísir á, at hann tók undir við avgerðini um, at skúlin á Trøllanesi skuldi lata uppaftur.

– Hetta er eftir mínum tykki í tráð við allan andan í okkara skúlapolitikki og útoyggjapolitikki. Bygdaskúlin er ein tann týdningarmesti liðurin í menning barnanna í nærumhvørvinum og er avgerandi fyri lív og menning kring landið alt, sigur Óli Holm.

– Eg mátti tó staðfesta eftir fund við umboð fyri Mikladals kommunu, at tey vildu ikki, at skúlagongd aftur skuldi vera á Trøllanesi. Harvið var knútur komin á málið.

Óli Holm sigur, at hann eftir hetta bað um eitt løgfrøðisligt upprit um, hvørt hann kundi skera ígjøgnum og lata skúlan upp aftur, hóast bygdaráðið var ímóti.

– Niðurstøðan var sum kunnugt, at tað kann landsstýrismaðurin ikki. Hesa niðurstøðu valdi eg at almannakunngera, samstundis sum eg helt fast við, at eg vildi gera mítt til at fáa loyst málið politiskt.

## Einki trýst ígjøgnum

Óli Holm heldur, at eftir hetta byrjaði eitt satt rok um heimildir og løgfrøði í málinum, har støðið verður tikið í tí uppriti, sum hann sjálvur hevði almannakunngjørt.

– Tað er sjálvsagt eitt mál fyri løgmann, landsstýrismálanevnd og Løgtingsins umboðsmann at kanna, heldur Óli Holm.

– Men eftir stendur, at ongin avgerð er trýst ígjøgnum, og skúlin á Trøllanesi er ikki latin uppaftur. Tann politiski kjarnin í málinum er sostatt júst har, sum hann byrjaði. Landsstýrismaðurin vil, at skúlin á Trøllanesi skal lata uppaftur, men lokali myndugleikin er ikki samdur.

Óli Holm vil við síni frágreiðing hava málið um skúlan á Trøllanesi aftur á beint, sum hann tekur til.

# Høgni Hoydal heldur fast um tíðarfreistina

**Tíðarfreistin fyri arbeiðið hjá grundlógarnevndini verður ikki broytt. Nevndin skal lata varaløgmanni úrslitið av sínum arbeiði við árslok**

GRUNDLÓG
*Eyðun Klakstein*



*– Sjálvandi kundi eg hugsað mær, at endaliga uppskotið um grundlóg var liðugt á nýggjárinum, men vit skulu minnast til, at tað týdningarmesta í hesum máli er ikki úrslitið, men tilgongdin, heldur Høgni Hoydal, varaløgmaður*

Tá árið er úti, skal Grundlógarnevndin lata landsstýrinum úrslitið av sínum arbeiði, og so skal støða takast til, hvat skal henda meira í málinum.

Tað ger Høgni Hoydal, varaløgmaður, greitt, nú formaðurin í Grundlógarnevndini hevur staðfest, at nevndin klárar ikki at halda tíðarfreistirnar, sum eru ásettar í lógini fyri grundlógarbeiðið.

Jóan Pauli Joensen hevur sent Høgna Hoydal bræv, har hann boðar frá, at nevndin klárar ikki at hava eitt endligt uppskot um føroyska grundlóg liðugt á nýggjárinum, soleiðis sum ætlanin hevur verið.

– Eg fegnist um brævið frá formanninum í Grundlógarnevndini, tí tað vísir, at nevndin ætlar at gera sítt arbeiði liðugt. Tað er umráðandi, at grundlógin ikki verður politisk kastibløka, soleiðis um okkurt tekin er um nú, sigur Høgni Hoydal, varaløgmaður.

## Nevndin neyvan sitandi

Fyrsta dagin í oktober mánaði fer Grundlógarnevndin at lata varaløgmanni eina statusfrágreiðing yvir arbeiðið hjá nevndini. Tá fer nevndin at gera upp, hvussu langt arbeiðið við føroyskari grundlóg er komið, og hvørjir partar av grundlógini kunnu fáa endaliga viðgerð áðrenn árslok.

– Sjálvandi kundi eg hugsað mær, at endaliga uppskotið um grundlóg var liðugt á nýggjárinum, men vit skulu minnast til, at tað týdningarmesta í hesum máli er ikki úrslitið, men tilgongdin. Fyri fyrstu ferð nakrantíð sita føroyskir politikarar og serfrøðingar og viðgera eina føroyska grundlóg, sigur Høgni Hoydal.

– Tá vit fáa úrslitið av arbeiðnum hjá Grundlógarnevndini, skulu vit viðgera, hvat skal henda víðari. Tá kunnu vit taka støðu til, um málið møguliga er búgvið til viðgerð í politisku skipanini.

Varaløgmaður heldur, at uppgávan hjá verandi Grundlógarnevnd er av á nýggjárinum, og nevndin verður neyvan sitandi eftir tað.

## Almenni leikluturin

Høgni Hoydal leggur stóran dent á, at almenningurin eisini fær høvi at viðgera uppskotið um føroyska grundlóg, men almennu hoyringarnar, sum skipast skal fyri, verða neyvan fyrstu nógvu mánaðirnar.

Grundlógarnevndin staðfestir, at hon hevur ikki stundir at skipa fyri hesum hoyringum í ár, og hon vísir eisini á, at valstríð til løgtings- og fólkatingsval kann fáa ávirkan á hesar hoyringar, verða tær hildnar í næstum.

– Tað er avgerandi fyri grundlógina, at fólk sleppa at siga sína hugsa um hana. Tí skulu almennar hoyringar verða, hóast Grundlógarnevndin ikki kann skipa fyri teimum, sigur Høgni Hoydal.

Arbeiðið at gera uppskot um føroyska grundlóg verður ikki liðugt á nýggjárinum, men Høgni Hoydal vónar, at arbeiðið er komið væl ávegis, tá árið er úti.